# Ein søga um børn og slakt

**Hesar seinastu vikurnar hevur myndamaðurin, Olav Schneider víst fram nakrar av fotomyndum sínum í Ribarhúsi. Framsýningin lat aftur í gjár, og nú verður so gjørt klárt til nýggja framsýning**

LIST
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Tað er eitt rættiliga forvitnisligt myndevni, sum myndamaðurin, Olav Schneider úr Kaldbak hevði valt sær til hesa framsýningina í býnum.

Hann kallaði framsýningina "Heystsuita" og var hetta ein søga um børnini og ein søga um slaktið í 21. øld.

Á framsýningini vóru ein hópur av myndum, sum vístu, hvussu barnaeygu uppliva alt tað, sum hevur við slakt at gera.

Myndirnar vísa alt tað, sum fer fram í sambandi við slaktið. Men tær vísa eisini, hvussu børnini luttaka í hesum arbeiðinum, og hvussu tey hava tað saman við teimum vaksnu.

Hesar myndirnar hevur Olav tikið á ymsum gørðum í Kaldbak, Kaldbaksbotni og á Sundi yvir eitt trý ára langt skeið - frá 2001 til 2004. Tær flestu myndirnar eru kortini tiknar á Bøgarði í heimbygdini Kaldbak.

Hetta er tó ikki bert ein fotoframsýning, tí við myndirnar hevur konan, Sonja Schneider gjørt sínar hugsanir um tær í yrkingum.

Ein forvitnislig framsýning, sum mong hava sæð. Og sum mong hava gleðst um.



*Ribarhús er vælegnað til framsýningar, eisini av fotomyndum. Hetta hevur myndamaðurin Olav Schneider roynt við góðum úrsliti*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# – Nú er ikki at sita inni





*Tey hugna sær við einum góðum bita í tí góða veðrinum mánadagin - dagrøktarmammurnar, Sunnleyg Olsen (h.m.) við sínum børnum og Hannelina Beder við sínum børnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

DAGRØKT
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Tað er ikki á hvørjum degi, at veðrið er so gott sum seinasta mánadag.

Tá ein er dagrøktarmamma so er hetta eitt gott høvi at fara ein túr í býin við børnunum. Og tað var júst tað, sum tær báðar Sunnleyg Olsen og Hannelina Beder gjørdu.

Tær pakkaðu taskurnar hjá børnunum og fóru til gongu oman í miðbýin. Í handlinum hjá Haraldsen keyptu tær børnunum okkurt at drekka, og so var bara at borðreiða fyri teimum á borðunum, sum eru sett upp omanfyri Mentanarhúsið.

– Vit plaga at vera úti, tá veðrið er gott. Vit eru oftast oman fyri bókasavnið, men valdu í dag, meiri spontant at fara oman higar, siga tær báðar.

Børnini eru í so ungum aldri enn, at alt rokið við og rundan um varmakeldustevnuna ikki hevur so stóran áhuga fyri tey.

Øðrvísi var tó í farnu viku, tá tey kongaligu vitjaðu eina lítla løtu í Fuglafirði. Tá vóru tær báðar við børnunum eisini á havnalagnum, tá sjóverjuskipið Brimil legði at landi við forkunnugu gestunum.

– Tá tosaðu børnini ikki um annað enn Mary!